# Andy missir alt árið

**FÓTBÓLTUR**
**– Um væl vil til, fái eg kanska teir síðstu fimm dystirnar við hetta kappingarárið, sigur Andy Olsen í ÍF, sum leygardagin var so óheppin at slíta hælsinuna**

Hilmar Jan Hansen




*Andy Olsen (uttast til vinstru) var leygardagin so óheppin at slíta hælsinuna, og tað merkir eftir øllum at døma, at hann ikki kemur at spæla stórvegis fótbólt fyri ÍF hetta kappingarárið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Synd er at siga, at 26 ára gamli søldfirðingurin, Andy Olsen, fekk nakra serligan byrjan hetta kappingarárið, tí tá ÍF leygardagin spældi ímóti EB/Streymi í Eysturoyarkappingini, fekk hann ein skaða, ið fer at kosta honum tað mesta av hesum kappingarárinum.

– Eg stóð einsamallur úti í síðuni, tá eg so bakkaði eitt sindur, og tá hoyrdi eg ein brest. Eg mátti hyggja aftur um meg, tí eg ivaðist ikki í, at her var okkurt heilt galið, greiðir Andy frá hendingini, tá hann fekk skaðan.

– Ta einu løtuna hugsaði eg, at bara tað ikki var onkur, ið hevði skotið eftir mær, og eg bleiv sera kløkkur av hesum.

Hann fekk ikki staðið á beinunum og bleiv kannaður beinanvegin, og tað vísti seg, at hann hevði slitið hælsinuna. Hetta er ein av teimum keðiligu og tíðarkrevjandi skaðunum, sum í fyrsta lagi krevur skurðviðgerð og síðani eina drúgva uppvenjingartíð.

### Má binda frið

– Mánadagin var eg lagdur undir skurð og tað gekk tíbetur væl í allar mátar. Men útlitini eru einki serlig, tí hetta merkir, at eg noyðist at binda frið í fleiri mánaðir, sigur Andy, sum eftir skurðviðgerðina hevur fingið beinið lagt í gips.

– Um væl vil til, fái eg kanska teir síðstu fimm dystirnar við hetta kappingarárið. Tað var ikki tað, eg ætlaði í ár, tí tað sær so spennandi út hjá ÍF, at eg heldur enn fegin vildi verið við so nógv sum møguligt. Men nú má eg finna meg í, at mín stuðul bara kann vera frá áskoðaraplássunum.

Andy Olsen hevur fingið sín fótbóltsuppvøkstur í NSÍ, men hevur síðani á sumri í 2008 spælt við ÍF, og har er hann fallin sera væl til. Andy er hálvur fuglfirðingur, so tað kendist av tí sama heldur ikki so fremmant at skifta frá NSÍ til ÍF, og hann hevur eisini havt trý góð kappingarár í Fuglafirði.

– At sita við beininum í gipsi er ikki akkurát nakað fyri meg, tí eg havi ongantíð havt nakað serligt av skaðum frá fótbóltinum. Hetta er mín fyrsti álvarsligi skaði nakrantíð, og eg havi ongantíð havt meira at drigist við, enn at tað hevur kostað mær ein dyst. Eg havi ongantíð verið so mikið skaddur fyrr, at eg havi mist tveir dystir, sigur hann.

### ÍF styrkir seg

At Andy kemur at sita uttanfyri mestsum alt hetta kappingarárið, kemur sjálvandi eisini illa við hjá ÍF, tí Andy hevur verið ein av teimum, ið hevur roynst væl og enntá skotið heilt fitt av málum. Men sambært heimasíðuna hjá ÍF er sáttmáli gjørdur við ein nigerianskan álopsspælara, sum kanska skal royna at fylla tómrúmið eftir Andy.

Talan er um 23 ára gamla Christian Muomaife, ið tey rópa Chris, sum hevur spælt í donskum fótbólti í eini fimm ár. Millum annað hevur hann spælt 81 dystir og skotið 17 mál fyri Viborg FF, umframt at hann hevur verið útleigaður til Hobro í fjør, har hann tó ikki fekk so nógv burturúr, tí hann var skaddur meginpartin av tíðini.

Nigerianski álopsspælarin var og royndarvandi í Fuglafirði í februar, og tá vísti hann so mikið, at ÍF nú hevur gjørt sáttmála við hann fyri kappingarárið 2011.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# Víkingur best í Eysturoynni

**FÓTBÓLTUR** **Fýra tey fremstu eysturoyarliðini í farna kappingarári hava spælt sínamillum Eysturoyarkapping í Fuglafirði**

Hilmar Jan Hansen

Í mong ár var Eysturoyarkappingin burturi, men fuglfirðingar hava blást lív í hana aftur, og verður hon spæld eftir sama leisti sum Klaksvíkskappingin. Tað vil siga, at fyrst eru tveir innleiðandi dystir millum fýra lið, og síðani verður spæld finala og dystur um triðjapláss.

Spælt verður um ferðasteyp, ið P/f Petur Larsen hevur latið, og tað kann vinnast til ognar við at vinna kappingina tríggjar ferðir á rað ella fimm ferðir tilsamans.

Fyrri innleiðandi dysturin var hóskvøldið millum ÍF og Víking, og har royndust gøtumenn og leirvíkingar betur, tí teir vunnu 4-2. Í hinum innleiðandi dystinum, sum var fríggjakvøldið, vann NSÍ 1-0 á EB/Streymi, men hóast bara eittans málið kom, var talan um nógvan álopsfótbólt, skilst.

Úrslitini merktu, at dysturin um triðjapláss beint eftir døgurða leygardagin skuldi spælast millum ÍF og EB/Streym, men av tí at hesin dysturin endaði við javnleiki 2-2, gjørdist neyðugt við brotssparkskapping. Hana vann ÍF 4-3, so tí gjørdist ÍF nummar trý og EB/Streymur nummar fýra.

Í finaluni millum Víking og NSÍ, sum var spæld seinnapartin leygardagin, vann Víkingur 2-1 og vann sostatt kappingina, meðan NSÍ bleiv nummar tvey. Líkt er til, at toppskjúttin í fyrraárið, Finnur Justinussen, er vælkoyrandi aftur, tí hann skjeyt fýra mál fyri Víking í báðum dystunum í kappingini.

*hilmarjan@sosialurin.fo*